GÍ-Skála:

# Illla sperdir Gøtumenn

**Við nýggjum málverja fara teir hjá GÍ at gera eina roynd at koma av botnsessinum, nú Skála skal royna at taka sín fyrsta sigur í Gøtu**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Tað hevur ikki gingist nakað serligt hjá GÍ higartil í ár. Liðið, sum annars hevur átt fast pláss í føroyska fótbóltsoddinum í nógv ár, tykist eftir fyrstu umførini at vera í beinleiðis niðurflytingarvanda. Og tað er ein støða, sum teir altso ikki eru vanir við.

Í vikuni fór málmansvikarurin, Hallur Hansen, aftur til Danmarkar, og tá Meinhardt Joensen framvegis er skaddur, hevur GÍ leitað sær nýggjan styrk til plássið. Sum vit skrivaðu í gjár, so hevur felagið fingið fatur á póllendska Marcen Dawid, sum er komin í yvirskot, nú Sumba og VB hava lagt saman.



*Í fjør fekk Skála javnleik í Gøtu, og tað er besta úrslitið hjá teimum í Sarpisgerði higartil*

### Fleiri ivamál

Sum skilst, so hava gøtumenn annars allar mans tøkar, og einki er at ivast í, at teir fara at leggja nógv fyri, tá Skála vitjar.

Venjarin hjá Skála er nevnliga maðurin, sum meira enn nakar legði lunnar undir gyltu árini í Gøtu. Og skal metast eftir seinastu 13 mánaðunum, so er Johan Nielsen um at gera tað sama á Skála nú.

Enn hevur Skála tó ikki roynt at vinna í Gøtu, men einki er at ivast í, at tað eru trý stig, sum teir fara eftir. Ikki minst, tí teir vilja reisa seg eftir tapið fyri VB seinast.

Hjá Skála var tað fríggjamorgunin ikki heilt greitt, hvussu standurin hjá leikarunum var. Bárður Danielsen hevur verið skaddur í einar tvær vikur, og hann hevur enn nakað av trupulleikum við fótinum. Nýggi málverjin, Vlada Erlipovic, hevur verið skaddur, men hann vandi so aftur hóskvøldið, og so er spurningurin, hvørt tað verður hesin ella Eugen Voda, sum skal verja málið. Og eisini nýggi verjuleikarin, Jenel Gorgunaru, hevur drigist við skaða. Hann hevur als ikki vant hesa vikuna, og tí er ivasamt, hvørt hann verður tøkur.

## Rætting

Í greinini um dystin millum Liverpool og Chelsea høvdu tvær villur snikt seg inn. Fyri tað fyrsta er tað ikki fyrstu ferð síðan 1992, at tvey bretsk lið møtast í Champions League. Tað er nevniliga so stutt síðan sum í fjør, at Arsenal og Chelsea spældu fjórðingsfinalu. So stutt røkkur minnið. Og tað næsta er, at Alberto Ricardo Carvalho hjá Chelsea var við til at vinna Champions League við FC Porto í fjør. Vit biðja lesaran halda okkum til góðar.

**-Stefan**

## HB størsti favoritturin

Á nordicbet.com ber sum vant til at fylgja við, hvørji sannlíkandini bookmakararnir meta fyri dystirnar, sum skulu spælast um vikuskiftið.

Her er HB størsti favoritturin, tá teir sunnudagin fáa vitjan av EBS/treymi. Næstir í so máta eru fuglfirðingar, tá hesir fáa vitjan av TB, meðan eisini KÍ, Skála og B36 verða roknaðir sum mest sannlíku vinnararnir um vikuskiftið.

Oddsini hjá Nordicbet eru annars hesi:

| Dystur | 1 | X | 2 |
|---|---|---|---|
| VB-B36 | 2,65 | 3,65 | 2,00 |
| ÍF-TB | 1,75 | 3,30 | 3,60 |
| HB-EB/S | 1,45 | 3,75 | 4,95 |
| GÍ-Skála | 3,05 | 2,80 | 2,15 |
| KÍ-NSÍ | 1,85 | 3,15 | 3,40 |

**-jm**

# FCK á veg í finaluna

**Hóskvøldið megnaði felagið hjá Toda Jónsson enn eina ferð at fara av vøllinum sum sigursharri, hóast ikki færri enn níggju spælarar vóru á skaðalistanum**

ROYALA LIGAN
*Jóannes Hansen*

Hóast ikki færri enn níggju spælarar hjá FCK í løtuni eru á skaðalistanum, so gongur tað framvegis strúkandi hjá teimum. Hóskvøldið spældu teir fyri síðstu ferð í millum umfarinum í Royalu liguni, og tað gekk so væl, sum tað kundi gera. Malmø FF var í Parkini, og FCK vann 2-1, eftir at Malmø hevði verið frammanfyri 1-0.

Sigurin var uppiborin, tí FCK bæði spældi betri og var meiri ágrýtið. FCK málini skoraðu Peter Møller og Sibusisu Zuma, sum mannaðu álopssessirnar báðar. Í steðginum stóð á jøvnum 1-1, og seinna málið fekk FCK eftir kiksað útspark frá Malmø málverjanum. Tá var ein tími farin.

Í FCK mugu teir bíða í tvær vikur, áðrenn tað verður greitt, um teir skulu spæla í finaluni, ella um tað verður Rosenborg, sum skal í finaluna. Treytin hjá Rosenborg er, at teir skulu vinna í Malmø. Tað heldur FCK venjarin, Hans Backe, fara at verða ógvuliga torført hjá teimum.Hann sigur seg ikki rokna við, at Malmø fer at tapa á heimavølli.

Tað er heldur ikki greitt, hvør hin luttakarin verður í fyrstu Royalu finaluni. Hóskvøldið vann Vålerenga á Ullevaal í Oslo 1-0 á Brann úr Bergen. Úrslitið ber við sær, at svenska IFK Göteborg nú hevur góðan møguleika at spæla seg í finaluna. Treytin hjá teimum er, at teir í síðsta umfarinum, sum verður 12. mai, megna at fáa í hvussu so er eitt stig, tá ið teir í Oslo skulu spæla ímóti Vålerenga, sum verður partur av finaluni, um teir vinna móti IFK Göteborg.

**formuladeildin**

| | dystir | v - j - t | vu. mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 B36 | 5 | 3 - 1 - 1 | 5 | 2 | 3 | 10 |
| 2 HB | 5 | 3 - 0 - 2 | 11 | 8 | 3 | 9 |
| 3 Skála | 5 | 2 - 2 - 1 | 10 | 5 | 5 | 8 |
| 4 ÍF | 5 | 2 - 2 - 1 | 9 | 9 | 0 | 8 |
| 5 VB | 5 | 2 - 1 - 2 | 3 | 3 | 0 | 7 |
| 6 KÍ | 5 | 2 - 1 - 2 | 8 | 9 | -1 | 7 |
| 7 NSÍ | 5 | 1 - 3 - 1 | 6 | 6 | 0 | 6 |
| 8 TB | 5 | 1 - 2 - 2 | 6 | 9 | -3 | 5 |
| 9 EB/Str. | 5 | 1 - 2 - 2 | 4 | 7 | -3 | 5 |
| 10 GÍ | 5 | 1 - 0 - 4 | 7 | 11 | -4 | 3 |

**SUNSET KAPPINGIN**
KVINNUR

| | dystir | v - j - t | vu. mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VB | 13 | 13 - 0 - 0 | 909 | 524 | 385 | 39 |
| 2 Stjørnan | 13 | 12 - 0 - 1 | 811 | 507 | 304 | 37 |
| 3 Neistin | 14 | 10 - 0 - 4 | 795 | 589 | 206 | 30 |
| 4 Søljan | 14 | 7 - 0 - 7 | 753 | 652 | 101 | 22 |
| 5 VÍF | 14 | 7 - 0 - 7 | 657 | 644 | 13 | 19 |
| 6 StÍF | 14 | 3 - 0 - 11 | 622 | 752 | -130 | 11 |
| 7 Kyndil | 14 | 3 - 0 - 11 | 539 | 778 | -239 | 9 |
| 8 Tjaldur | 14 | 0 - 0 - 14 | 400 | 1040 | -640 | 0 |

ÍF-TB:

# TB hevur trupulleikar við miðvøllinum

**Hóast mótstøðuliðið er uppflytari, so halda fuglfirðingar, at úrslitini hjá TB tala fyri torførari uppgávu í morgin**

UPPTAKT
*Jóannes Hansen*

Øll orsøk er til, at sjálvsálitið hjá TB skal vera í lagi, tá ið teir í morgin fara á vøllin í Fuglafirði. Teir vunnu sunnudagin á heimavølli móti EB/Streymi, og fyri trimum vikum síðani megnaðu teir málleysan javnleik í Runavík.

Í morgin verður tað ivaleyst uppskriftin, sum teir nýttu í Runavík, sum verður frammi hjá TB. Tað ræður um at vera tættur í verjuni og so dúva upp á onkran møguleika í snarálopum, og so leingi, sum tað ikki eydnast mótstøðumonnunum at gera mál, er klokkan í parti við TB.

Á Sevmýri hava teir trupulleikar við tveimum miðvallarspælarum, sum teir roknaðu við skuldu vera lyklaspælarar. Annar er Alexander Jovevic, sum ikki hevur spælt fleiri tær seinastu ferðirnar. Hann er so spakuliga farin at venja aftur, men í gjár roknaðu teir ikki við, at hann verður tøkur í morgin. Hin er Daniel Nyarko, sum noyddist út móti EB/Streymi, og sum ikki hevur vant í hesi vikuni.

Í Fuglafirði hevur gingið væl higartil, men teir í ÍF rokna við, at uppgávan verður torfør í morgin. Fuglfirðingar plat at vera stinnir í deyðbóltsstøðum, og tað kann væl vera, at sovornar fara at hava stóran týdning í morgin, men tað verður ikki lætt, tí teir í TB verjuni eru bæði stórir og sterkir.

Allir ÍF spælararnir eru tøkir. Eisini Hanus Eliasen, sum ikki var við í Runavík, tí hann var skaddur.